JAVNI

Menningartarnað við sálarligum breki

Foreldur og avvarðandi eru hjálparleys. Staðfest er, at tann vanliga sálarliga viðgerðarskipanin hevur eina avmarkaða vitan um menningartarnað.

Javni bjóðar til almennan fund í komandi viku. Evnið hesaferð er menningartarnað við sálarligum breki.

Títtleikin av sálarligum brekum/sjúkum er høgur. Og støðan hjá menningartarnaðum, sum hava sálarligar trupulleikar í viðbót, er eins og í okkara grannalondum, sera trupul.

Foreldur og avvarðandi eru hjálparleys. Veruleikin er at starvsfólkini á stovnunum eru í somu støðu. Staðfest er, at tann vanliga sálarliga viðgerðarskipanin bara hevur eina avmarkaða vitan um menningartarnað. Trupult hevur verið at fingið eitt tvørfakligt samstarv millum pedagogar, sálarfrøðingar og psykiatarar – av tí sama eru royndirnar ikki so nógvar.

Serkøn úr Danmark

Í sambandi við at tað verður skeið fyri menningartarnað í Føroyum, verða tveir konsulentar frá LEV og tvey foreldur her. Tað verður Frank Ulmer Jørgensen, konsulentur, ið fer at halda fyrilestur. Frank Ulmer starvast hjá LEV (danska felagnum fyri menningartarnað). Hann hevur í mong ár arbeitt saman við »Videncentrinum fyri sosialpsykiatri« í Danmark. Í tøttum samstarvi við hesi hevur hann verið til at seta fokus á hetta økið. Tað er aðru ferð, at Javni tekur evnið upp alment í Føroyum.

Fakfólk

Tað er ikki so ofta, at vit hava serkøn á hesum økjunum í Føroyum. Javni vil so fegið verða við at veita foreldrum og avvarðandi eina vita. Hesaferð heitir Javni eisini so inniliga á øll fakfókl innan heilsuverkið, serliga á psykiatriska økinum og á skúlarnar um at møta fjølment.

Møguleiki verður eisini at seta spurningar og viðmerkingar.

Hetta er eitt sera átroðkandi mál, sum vit heita á fólk um at møta fjølment til.

Fundurin, ið er fyri øll, verður á Hotel Hafnia mikukvøldið 6. september kl. 19.00.

Havnar KFUK-skótar

Í komandi viku byrja KFUK-skótarnir í Havn virksemi sítt aftur eftir stuttan summarsteðg.

Havnar KFUK-skótar ella grønu gentuskótarnir, sum nógv av okkum kenna tær, fara í ár undirnýggjan flokk, spíraflokkurin, sum er fyri gentur 6-7 ár (føddar 1993 og 1994).

Umframt spíraflokkin er eisini: títtlingaflokkurin, sum er fyri gentur, sum ganga í 2. til 4. flokki, skótaliðið, sum er fyri gentur, sum ganga í 5. til 8. flokki, og eitt ungdómsskótalið, sum er fyri gentur frá 9. flokki og eldri.

Skótafundur er einaferð um vikuna, har ymisk virksemi er á skránni. Eisini eru vit á legum, túrum av og á. Serliga á Langasandi, har liðið eigur eini hús. Skótar og ungdómsskótar eru ofta á legum uttanlands og seinastu tvey árini hava eisini elstu títtlingarnir verið í Danmark á legu.

Spírar og títtlingar hava skótafund mikudag kl. 16.30 til 18.00, skótar hóskvøld kl. 19.00 til 21.00, og ungdómsskótar týskvøld frá kl. 19.00.

Havnar KFUK-skótar vórðu stovnaðir 9. mai 1928 og hava verið sera virkin øll árini.

Arbeiðsgrundarlagið er gjøgnum skótaarbeiði at útvega tær best møguligt treytir fyri einum felagsskapi, har frælsi fyri einstaklingin er størst møguligt, samstundis sum ein átekur sær ábyrgd fyri felagsskapinum.

Samsvarandi skótalóg og -lyfti vil skótarørslan við sínum arbeiði á tjóðskaparligum og alheims stigi hjálpa skótunum at virka í føroyska samfelagnum og at arbeiða fyri góðum vinalagi tjóðanna millum.

Hevur tú hug at gerast **grønur-gentuskóti**, ert tú vælkomin niðan í KFUK, Varðagøtu 9. Sí annars lýsing í blaðnum.

Mediaverkstaður á Margarinfabrikkini

Mediaverkstaðurin hevur fingið stuðul frá Undirvísingar- og Mentamálastýrinum, »Verkætlanir til gagns fyri børn og ung«, at byrja 1. sept.

Margarinfabrikkin hevur síðani farið varð undir net café fyri nærum tveimum árum síðani, støðugt vaksið um tilfeingið av teldum og forritum. Teldurnar verða í dag mest nýttar til telduspøl og chat. Við tilboðnum um undirvísing er ætlanin at hækka um støðið hjá limunum á telduøkinum, frá bert passivt at nýta forrit á teldunum, til at skapa sjálvi.

Endamálið við mediaverkstaðnum er at gera tey ungu før fyri at nýta tøknina í mediaverkstaðnum á Margarinfabrikkini, nema kunnleika til hættir og snið innan multimedia nýtslu og at skipa alt framleitt tilfar á heimasíðuni hjá Margarinfabrikkini á ein slíkan hátt, at foreldur, skúlar og onnur kunnu uppliva forvitnisliga barna- og ungdómsarbeiðið í Margarinfabrikkini í høvuðsstaðnu.

Flestu skúlar í Føroyum eru bundnir saman í net, eru skipaðir í KT-deplinum og tey ungu hava telduposthústaðir. Margarinfabrikkin hevur sæð tørvin fyri víðari menning av tí skapanarligu evnunum hjá teimum ungu og børnunum, afturat møguleikanum at nýta eina teldu. Tankin aftan fyri mediaverkstaðin er at skapa eitt leikarúm, har børnini og tey ungu skapa myndir, filmar og heimasíður, har forvitni er drívmegin.

Mediaverkstaðurin skal stimbra tey ungu til at nýta tøknina og skapa hugnaligar karmar um eitt støðugt mennandi tilboð, sum á høgum fakligum støði veitir luttakaranum sína sjálvstøðugu upplæring, treytað av áhuga og evni at arbeiði við tøknini. Undirvísari er Laufey H. Blaasvær, sum seinastu trý árini hevur havt líknandi mediaverkstað í Norðurlandahúsinum.

Undirvísingin verður løgd í samsvari við leiðaran Henrik Andersen og starvsfólk á staðnum,ið lata kunnandi tilfar um komandi tiltøk. Ætlanin er at starvsfólkini eins og limirnir skulu fáa undirvísing og megna at standa fyri framtíðar frálæru sjálvi. Í Margarinfabrikkini starvast umframt dagliga leiðaran tveir pedagogar og tvey ung í arbeiði.

Undirvíst verður týsdag og hósdag frá kl. 15-17 fyri børnum 9-13 ár og frá 19-21 fyri teimum ungu limunum.

Kappsiglingin endað

Sunnudagin 27. aug. hevði Lions Club Eysturoy sína árligu kappsigling á Skálafjørðinum, tann 31. í røðini.

Samstundis er hetta eitt slag av finalu í sambandi við tær kappsiglingar, sum felagið Seglið skipar fyri.

Luttøkan var sum vant sera góð. Tað luttóku 37 bátar úr ymsum bygdum og komu teir allir á mál í øllum góðum. Startskotið var í ár inni í Skálafirði og málið var sum vant úti á Høgaból.

Eitt frískt lot av útnyrðingi norði gav bátunum ein góðan start og fylgdust bátarnir reiðiliga væl til komið var út um Skálaleiðina, tá tjánaði lotið nakað, fyri so aftur at menna seg aftur tá komið var nakað út um Gjaranes.

Hetta gjørdi at bátar rættuliga ofta skiftu raðfylgju og sum sostatt eisini var við til at gera kappsiglingina meira spennandi.

Tað var ein vøkur sjón at síggja bátarnar koma út eftir fjørðinum, og nógvir vóru bilarnir, sum báðu megin fjørðin fylgdu við siglingini umframt tey mongu á Skálafjørðinum, sum kundu fylgja við siglingini úr teirra egna vindeyga. Komin á mál varð sum vant boðið til kaffi og pannukøkur í matarhøllini hjá Føroya Fiskavirking í Runavík, sum hevði lagt høli til.

Nú hesin dagurin mestsum er blivin ein familjudagur, har familjulimir taka ímóti siglandi bátunum, er blivið heldur trongligt í matarhøllini, men við einum góðum vilja fingu nokk allir siglingarmenninir sess.

Takkarkvøða varð borin frá Lions til siglararnar, sum so trúliga hava siglt og gjørt hesa sigling til tað, hon er í dag. Lions vónaði, at tað stavnhald, sum teir settu sær fyri 31 árum síðani, – tað at vekja áhuga fyri sigling og kunnleika til at handfara segl – hevði borið ávøkst.

Takkaði somuleiðis felagnum Seglinum, sum so hugagott hevði tikið undir við hesum stavnhaldinum, og skipað fyri fleiri kappsiglingum.

Bátarnir komu í mál í hesi røð:

Nr. 1 Guðrið, Saltangará, steyp og ferðasteyp
Nr. 2 Leivur, Kollafjørður, steyp
Nr. 3 Gjáarbáturin, Kollafjørður, steyp
Nr. 4 Thyra, Strendur
Nr. 5 Sníkur, Kollafjørður
Nr. 6 Mia, Strendur
Nr. 7 Olivia, Kollafjørður
Nr. 9 Vinur, Tórshavn
Nr. 10 Hoyvíksbáturin, Hoyvík
Nr. 11 Lítlibátur, Hósvík
Nr. 12 Koltursbáturin, Kollafjørður
Nr. 13 Eyðbjørg, Skála
Nr. 14 Byrgishamar, Kollafjørður
Nr. 15 Rakul, Toftir
Nr. 16 Luna, Lamba
Nr. 17 Guðrun, Saltangará
Nr. 18 Búgvin, Toftir
Nr. 19 Jensabátur, Nólsoy
Nr. 20 Dúgvan, Lamba
Nr. 21 Teistin, Strendur
Nr. 22 Ternan, Hósvík
Nr. 23 Helga, Kaldbak
Nr. 24 Miðgerð, Kollafjørður
Nr. 25 Lítli Lundi, Skála
Nr. 26 Pluto, Skála
Nr. 27 Tyrilshattur, Strendur
Nr. 28 Thorshavn, Argir
Nr. 29 Svanur, Skála
Nr. 30 Niels í Nesinum, Tórshavn
Nr. 31 Kallsoy, Leirvík
Nr. 32 Havgásin, Hósvík
Nr. 33 Brandur, Nes
Nr. 34 Sørin, Kolbanargjógv
Nr. 35 Góðadalsbáturin, Saltangará
Nr. 36 Fiskedrætt, Strendur
Nr. 37 Skúlabáturin, Dalur

Folkekirkens Pædagogiske Institut skeið í Føroyum

Í komandi viku koma fólk frá Folkekirkens Pædagogiske Institut til Føroya at halda skeið fyri prestum, lærarum o.ø.

Folkekirkens Pædagogiske Institut er ein eftirútbúgvingar-stovnur hjá Fólkakirkjuni við tí endamáli at stuðla prestum og øðrum, sum hava ábyrgd av kristnifrálæru. Føstu lærararnir á stovninum og gestalærarar halda alt árið skeið á stovninum í Løgumkloster og úti um landið.

Hetta er aðru ferð Folkekirkens Pædagogiske Institut heldur skeið í FØroyum og tað eru rektarin Eberhard Harbsmeier, Gertrud Iversen, lektari ph.d., Svend Bjerg, lektari í guðfrøði í universitetinum í Keypmannahavn og Steffen Johannesen, lektari á Danmarks Lærerhøjskole, sum koma hesaferð. Prestarnir fara á skeið í Norðurlandahúsinum mánadagin 28. og týsdagin 29. aug., og somu dagar hevur Steffen Johannesen skeið fyri lærarum í eftirútbúgving. Mikukvøldið 30. august kl. 20 heldur Svend Bjerg almennan fyrilestur á fróðskaparsetrinum við heitinum: »Gør kærligheden blind? Om teologien og sanserne« og hósdagin 31. august hava tey tímar á landsmiðstøðini fyri undirvísingaramboð og á Føroya Studentaskúla.

Annars fer rektarin Eberhard Harbsmeier at prædika við guðstænastuna sunnudagin 27. august kl. 11 í Haldarsvíkar kirkju, Gertrud Iversen prædikar kl. 12 í Hvalvíkar kirkju og Svend Bjerg prædikar kl. 11 í Dómkirkjuni.

ÍTRÓTTUR
e-mail: jakup@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

Lesið eisini ÍtróttaSosialin á alnetinum:

www.sosialurin.fo

Leikararnir tykjast vera væl fyri

Sum heild tykjast fótbóltsútisetar okkara at standa seg væl í feløgum teirra, og heta, samanhildið við at heimliga kappingin er í hæddini, átti at borga fyri einum sterkum landsliðið

Hjá Julian og teimum í Sogndal gongur sum eftir ánni í løtuni, og yvirhøvur tykjast landsliðsleikarar okkara at vera sera væl fyri í løtuni

JÁKUP MØRK

Fótbóltsliga hevur gingið skiftandi hjá føroysku útisetunum, nú flestu tearna koma heim til landsdystin móti Slovenia.

4 leikbannaðir

Hjá føroyingunum á Ólafsfirði hevur einki vilja borið til í ár, liðið, sum telur 4 føroyskar leikarar, hevur havt eina sera vánaliga byrjan upp á árið, og seinastu vikurnar er niðurflytingarhóttanin vorðin alsamt meira sjónlig.

Um vikuskifti taptu teir botndystin móti Stjarnuni í einum dysti, har venjarin, Jens Martin Knudsen, ikki kundi nýta Sámal Joensen ella John Petersen vegna leikbann.

Komandi umfar skal Leiftur royna seg móti Fram, sum er liðið beint omanfyri niðurflytingarstrikuna. Skal Leiftur hava møguleika at verða verandi í deildini, er alneyðugt við einum sigri, og helst skal hesin vera við fleiri málum.

Fortreytirnar undan dystinum eru tó ikki av teimum bestu, tí fýra leikarar, teirra millum Jens Martin Knudsen, eru leikbannaðir undan dystinum.

Uni skoraði

Hjá Una Arge og ÍA hevur gingist nakað betri, og hóast teir eru nakað langt frá oddinum, tá tosað verður um gullmerki, so hevur ÍA avgjørt møguleika at sleppa út í Europa komandi ár.

Sæð við føroyskum eygum, er tað gleðiligt, at Uni Arge nú aftur hevur fingið gongd á málskjótingina. Álopsmaðurin, sum hevur drigist við drúgvan skaða í ár, skeyt fyrsta landskappingarmál sítt, tá ÍA um vikuskiftið vann 4-1 á Fram.

Sogndal flúgvandi

Hjá teimum trimum landsliðsleikarunum, sum royna seg í norskum fótbólti, hevur gingið við fullari ferð seinastu vikurnar. Burtursæð frá einum keðiligum tapi á skrivaraborðinum, hevur talan bert verið um sigrar í august mánaði, so einki er at siga til, um sjálvsálitið er gott í løtuni.

Tapið á skrivaraborðinum ger tó, at tað verður torført hjá Sogndal at vinna sær beinleiðis uppflytan í bestu deildina. Fimm stig eru upp til annað plássið, nú seks umfør eru eftir at leika.

Gongur framá í Danmark

Ein spildurnýggjur maður er í landsliðshópinum til dystin móti slovenum. Johan Byrial Hansen, sum í fjør skrivaði sáttmála við ÓB, er fyri fyrstu ferð úttikin til landsliðið.

Um hetta er byrjanin til eina nýggja merkistíð í føroyskum fótbólti skal ikki gitast um, men í øllum førum er hetta fyrstu ferð, at ein leikari, sum er heimahoyrandi í øðrum landi, er úttikin til føroyska landsliðið.

Johan hevur føroyska mammu, og tí er eingin trupulleiki í úttøkuni, men undir øllum umstøðum verður spennandi at vita, hvussu nýggi leikarin fer at standa seg í hópinum. Aðra staðni hevur tað í fleiri ár verið vanligt, at leikarar verða bidnir um at spæla fyri okkurt landslið, um eitt nú omman er ætta hagani. Eitt tað besta dømi um hetta man vera Írland, har fyrrverandi landsliðsvenjarin, Jack Charlton, bar orð fyri at vera betri ættargranskari enn venjari.

Johan hevur í ár verið á vølli tríggjar ferð fyri OB, sum í løtuni er á 9. plássi í superliguni.

Fremsta føroyska liðið í superliguni er heldur óvæntað AGF, har Óli Johannensen er í hópinum. Seinasta hálva árið ella so hevur Óli tó ikki verið at sæð á vøllinum, men sunnudagin var hann aftur at síggja, og yvirhøvur stóð hann seg væl, hóast AGF mátti lúta 3-1 fyri Herfølge.

Hjá Herfølge hevur annars ikki gingist eins væl og í fjør, tá liðið gjørdist meistari. Í løtuni er liðið næstniðast, men seinastu dystirnir hava kortini givið ábendingar um eina ávísa framgongd.

Todi Jónsson hevur higartil verið fastur fúsur í byrjunaruppstillingini hjá FCK, og hóast úrslitini ikki hava verið eftir vild, bendir einki á, at hann skal missa miðvallarsessin, sum hann nú hevur vant seg við. Sunnudagin var hann millum teir mest eyðsýndu í 2-1 sigrinum hjá FCK móti Brøndby. Ein sigur, sum hevði ómetaliga stóran týdning fyri FCK, tí vónirnar um eitt gott hál komandi dystirnar nú tykjast nógv bjartari.

Heildarmetingin er positiv

Sum heild kann helst staðfestast, at fótbóltsliga eru flestu útisetar okkara sera væl fyri í løtuni. Minuttirnir, sum teir fáa á vølli tykjast undir ongum umstøðum at fækka, og hóast ítróttarliga gongdin hjá ymsu feløgunum er ymiskt, so tykjast positivu lutirnir at viga væl meira enn teir negativu.

Heimligu landsliðsleikararnir skuldu helst verið á toppinum júst nú, so fortreytirnar fyri einum góðum úrslitið sunnudagin fáa valla verið betri.

Í hesum døgum er Regin ikki eins einaráðandi í Føroyum, sum hann vanliga er

Risarnir komnir

Kappingarneytarnir hjá Regini í kappingini um at gerast Atlantsrisin eru nú komnir til Føroya

JÁKUP MØRK

Teir átta sterku menninir, sum um leygardagin fara at kappast um at gerast Atlantsrisin, fara í dag at hyggja seg eitt sindur um í høvuðsstaðnum, og eisini fær almenningurin høvi at heilsa upp á teir.

Risin hittir risar

Tað er høvuðsstuðulin hjá Regini Vágadal, Formula.fo, sum skipar fyri nøkrum tiltøkum, og eisini almenningurin fær møguleika at heilsa upp á stóru menninar.

Kl. 13.00 í dag fara sterku menninir á internet-caféina, Orbit, har teir fara at hugna sær í okkur tum ein tíma.

Av Formula.fo verður sagt, at øll sjálvandi eru væl komin inn á gólvið at vitja, men at stóru menninir siga seg vilja hava frið hesa løtuna. Teir vilja nevnliga nýta høvið til at kappast móti hvørjum øðrum í telduspølum, heldur enn at vita, hvør kann lyfta tyngstu lutirnar.

Alment í SMS

Eftir at teir soleiðis hava kappast eina løtu, verður farið niðan í SMS, har teir verða at síggja í 3-arin electronics.

Her verður sjálvandi opið hús, og fólk fáa høvi til at práta við risarnar, umframt at autografskriving sjálvandi eisini verður á skránni.

Hjálpa Regini

Eftir at teir í ein tíma hava verið í SMS, fara teir so at gera seg til, at fara á flot.

Talan er um eina útferð við Norðlýsinum, soleiðis at luttkararnir eisini fáa høvi til at síggja ein part av Føroyum og stórslignu náttúru okkara.

Allarhelst vóna luttkararnir, at veðrið verður gott meðan útferðin er, men á Formula.fo siga tey, at tað bilar kanska einki, um tað er eitt sindur sjaskut. Hetta halda tey nevnliga kann verða Regini til fyrimuns.

Regin er jú skipari, og hevur eisini siglt við Grønland, so verður talan um sjóverk av onkrum slag, verður hetta helst til fyrimuns fyri Regin.